# Kendur prestur gestur í Lindini

**Mest umtalaði føroyski presturin seinastu vikunar, hvalvíkspresturin Mogens Tilsted Christensen, verður hóskvøldið gestur hjá Jenis av Rana í beinleiðis sending í Lindini**

ÚTVARP
*Súsanna L. Olsen*



*Hvalvíksprestur verður í Lindini hóskvøldið*

Byrjað verður kl. 21.00, og í 2-3 tímar fara teir báðir at tosa um ymisk viðkomandi evni.

Sum vant verður høvið hjá lurtarum at ringja inn við viðmerkingum og/ella bønarevnum.

Mogens Tilsted Christensen er føddur 10 apríl 1944. Er giftur við donsku sjúkrasystirni Anna Christensen, eigur 3 børn og 3 abbabørn. Í 1967 fekk hann HH-studentsprógv á handilsskúlanum í Århus og hægri handilsskúla. Hann bleiv søluráðgevi í 1967-69.

Í 1969-2002 var hann ognarseljari og ognarráðgevi, meðan hann gekk á bíbliuskúla og læs gudfrøði frá 1991. Seinni bleiv hann innskrivaður á lærdan háskúla í Århus í 1992. Frá 1996-98 var hann samskiftistøknikur fyri tað Kristiliga Dagblaðið.

Í 2002 fekk hann Cand. theol. (t.v.s. at hann fekk prestaútbúgving) á Fróðskaparsetrinum í Århus.

Í 2003 bleiv hann sóknarprestur í Tjørnuvík, Haldórsvík, Saksun, Hvalvík, Hósvík, Kollafirði, Kvívík og Vestmanna kirkjum í Føroyum.

# Ferðslutrygdarráðstevnan í Føroyum

**Í morgun kl. 9.00 byrjaði ráðsetvnan „Lívsnetyðug ráðstevna - RFF 30 ár“ í Norðurlandahúsinum, har fyrilestrahaldarar úr bæði Føroyum, Danmark og Svøríki luttaka**

RÁÐSTEVNA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



Ráðstevnan er tann fyrsta í Føroyum av sínum slagi. Hetta er eisini fyrstu ferð í søguni, at Ráðið fyri Ferðslutrygd í Føroyum skipar fyri eini ráðstevnu.

Vegna Ferðslutrygd beyð Rúna Sivertsen, formaður í Ferðslutrygd, øllum at verða hjartaliga vælkomin til ráðstevnuna. Hon segði m.a. Tað var við bjartskygni og góðum vónum tey tíðliga í fjør fóru undir at leggja hendan dagin til rættis. Vit hava lagt okkum eftir at gera ráðstevnuna so viðkomandi og fjølbroytta sum møguligt.

Framvegis hava vit onga politiska endamálsorðing á ferðslutrygdarøkinum

Og tískil hava vit heldur onga politiska virkisætlan fyri ferðslutrygdini í Føroyum.

Í ferðslutrygdarhøpi kunnu vit tí ikki samanbera okkum við okkara grannalond. Tað er ikki av tilvild at vit hava hægri ferðsluvanlukkutøl enn grannalond okkara.

Tað er ikki bara her og í grannalondum okkara at miðað verður ímóti Nullhugsjónini. Við slagorðunum, “Ferðslutrygd er Null vanlukkur”, var ferðslutrygdin evnið á alheims heilsudegnum hjá WHO í 2004. Í setanarrøðuni segði franski forsetin, Jacques Chirac: “Ferðsluvanlukkur eru ein vanlagna, sum heimsøkir tann modernaða heimin.”

Hetta var fystu ferð í søguni hjá WHO, at alheimsheilsudagurin var halgaður ferðslutrygdini, segði Rúna Sivertsen.

Á ráðstevnuni verða fleiri fyrilestrar av bæði føroyskum og norðurlendskum fyrilestrahaldarum, eins og filmsklipp og kjakpanel.

**Dagurin í morgin**

**20. januar. Brøðramessa.** Hildin til minnis um teir báðar Fabianus og Sebastianus. Teir eru ikki brøður, men vórðu fyri trúar sakir tiknir av døgum sama dag í árinum, Fabanus, sum var pávi, umleið ár 250, og Sebastianus – kristin hermaður – umleið ár 288. Tað sigst, at teir báðir eru jarðaðir undir tí núverandi kirkjuni San Sebastian í Róm. Fabianus er rómverskt ættarnavn. Sebastianus er upprunaliga grikst navn, ið merkir heiðurverdur.

Thomas Carlson, NTF, í Norðurlandahúsinum:

# Føroyska vegakervið ikki nóg trygt

**Í fyrilestri sínum á ráðstevnuna um ferðslutrygd í Norðurlandahúsinum, hevði Thomas Carlson, fjølmiðlaleiðari hjá NTF í Svøríki, nakrar viðmerkingar til føroyska vegakervið**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Thomas Carlson, fjølmiðlaleiðari hjá NTF í Svøríki, hevði sínar viðmerkingar til vegakervið í Føroyum í Norðurlandahúsinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fyrsti fyrilesturin á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum var „Nollvisionen - utopi eller verklighet“. hjá Thomas Carlson, fjølmiðlaleiðari hjá NTF í Svøríki (Nationalföreningen för Trafiksäkerhetens Främjande).

Í fyrilestrinum kom hann eisini inn á føroyska vegakervið.

Thomas Carlson hevur nú í nakrar dagar koyrt kring landið og hugt eftir vegakervinum í Føroyum. Hann legði til merkis, at vit hava alt ov lítið av autoverju á høvuðsvegnum. Serliga har vandi er fyri at bilurin rennur inn í bergið oman fyri, har mangla vit autoverjur, eisini nógvastaðni er eingin vegøksl og eingin autoverja. Um ein bilur fer út av vegnum, er stórur vandi fyri, at hann t.d. endar á sjónum.

Eisini heldur heldur hann at við vegamótini á landsvegnum, har tveir síðuvegir koma inn á landsvegin, skuldi ferðin verið sett niður frá 80 km/t til 50 km/t, tí um ein bilur rennur inn í síðuna á einum øðrum bili við meira enn 50 km/t, er stórur vandi fyri at tey, sum verða ákoyrd frá síðuni, kunnu lata lív.

Eisini hevur hann eina viðmerking til ferðsluna inni í býunum, har nógv fólk ganga og nógv ferðsla er. Har áttu ferðin at verið avmarkað til 30 km/t, tí um fólk vera yvirkoyrd við meira enn 30 km/t, er stórur vandi fyri at tey kunnu lata lív.

Vegakervið er eitt tað mest ófyrigevnadi tekniska systemið í samfelagnum, tí tað er næstan treytað av lýtaleysum brúkarum - eitt menniskjanligt mistak kann verða straffað við deyðanum.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800**

Sosialurin